## Soleiðis atkvøddu tinglimirnir

Uppskotið hjá Bergtóru Høgnadóttir Joensen at bannað ungum undir 18 ár at taka sól, fall fríggjakvøldið. Niðanfyri sæst, hvussu tinglimirnir atkvøddu.

**JA: 13**
Hergeir Nielsen, Tjóðveldi
Heini O. Heinesen, Tjóðveldi
Bergtóra H. Joensen, Tjóðveldi
Bjørt Samuelsen, Tjóðveldi
Annita á Fríðríksmørk, Tjóðveldi
Høgni Hoydal, Tjóðveldi
Marjus Dam, Sambandsflokkurin
Kári P. Højgaard, Sjálvstýrisflokkurin
Kári á Rógvi, Sjálvstýrisflokkurin
Jenis av Rana, Miðflokkurin
Bill Justinussen, Miðflokkurin
Karsten Hansen, Miðflokkurin
Torbjørn Jacobsen, Tjóðveldi

**NEI: 18**
Edmund Joensen, Sambandsflokkurin
Helgi Abrahamsen, Sambandsflokkurin
Bjørn Kalsø, Sambandsflokkurin
Alfred Olsen, Sambandsflokkurin
Edva Jacobsen, Sambandsflokkurin
Bjarni Djurholm, Fólkaflokkurin
Jákup Mikkelsen, Fólkaflokkurin
Annika Olsen, Fólkaflokkurin
Jacob Vestergaard, Fólkaflokkurin
Jógvan á Lakjuni, Fólkaflokkurin
Jørgen Niclasen, Fólkaflokkurin
Katrin Dahl Jakobsen, Javnaðarflokkurin
Jóannes Eidesgaard, Javnaðarflokkurin
Eyðgunn Samuelsen, Javnaðarflokkurin
Hans Pauli Strøm, Javnaðarflokkurin
Gerhard Lognberg, Javnaðarflokkurin
Poul Michelsen, Framsókn
Mikkjal Sørensen,

## Ætlaðu at leggja uppskotið fram

Í løgmansrøðuni á ólavsøku í fjør, boðaði Kaj Leo Johannesen, løgmaður frá, at Heilsumálaráðið fór at leggja fram uppskot um at banna ungum undir 18 ár at taka sól. Aksel V. Johannesen var tá landsstýrismaður í heilsumálum. Uppskotið kom ongantíð í tingið.

- Tá John Johannessen tók við sum landsstýrismaður, segði hann mær, at hann fór ikki at leggja uppskotið fram, tí honum dámar betri upplýsing heldur enn forboð, sigur Bergtóra Høgnadóttir Joensen.

**Brot úr løgmansrøðuni á ólavsøku:**

*Uppskot til løgtingslóg um at banna solarium fyri ung undir 18 ár*

*Endamálið við lógini er at fyribyrgja húðkrabbameini. Sera stórur vøkstur hevur verið í talinum av fólki, sum hava fingið staðfest húðkrabbamein. Í krabbameinsálitinum er mælt til at banna solarium fyri ung undir 18 ár sum liður í einum fyribyrgjandi átaki. Líknandi átøk eru gjørd í fleiri av okkara grannalondum.*

# Einki forb hesum sin

**Vit skulu sjálvsagt seta tiltøk í verk fyri at minka nýtsluna, men framvegis verður tað ikki bannað ungum undir 18 ár at taka sól. Tað var niðurstøðan í løgtinginum fríggjadagin**

**Uni Holm Johannesen**
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum, tók undir við hugskotinum. Hann tóktist hinvegin skakkur.

- Fyri fáum døgum síðani viðgjørdu vit uppskotið at bryggja sterkt í Føroyum. Tá var niðurstøðan, at eitt samfelag, sum setir forboð, er eitt ræðuligt samfelag. Tá var eingin trupulleiki hjá løgtinginum at trumfa eina lóg ígjøgnum. Eg vil ikki nevna her, hvør flokkur legði tað uppskotið fram, segði Jenis av Rana undir viðgerðini. Hann vísti til uppskotið hjá Bjørt Samuelsen úr Tjóðveldi at bryggja sterkt.

Bergtóra Høgnadóttir Joensen, Tjóðveldi, vil fegin bannað børnum og ungum undir 18 ár at taka sól í solarium. Endamálið er at fyribyrgja og minka talið á krabbameinstilburðum. Krabbameinsfelagið kom við tilmælinum í fjør og staðfesti, at solarium økir fleirfald um vandan fyri krabbameini í húðini og móðurmerkjakrabba. Ung fólk hava serliga viðkvæma húð. Tannáringar eru í størri vanda enn eldri at fáa krabbamein av solarium.

Bergtóra Høgnadóttir Joensen legði uppskot fram fyri tingið. Hon segði í viðmerkingunum, at ung fólk eru serliga upptikin av at rigga væl. Ung fólk halda seg ofta síggja betur og frískari út, tá tey eru sólbrend, eisini um veturin. Tá er solarium ein upplagdur møguleiki.

- Solarium er lívshættisligt, sigur tingkvinnan fyri Tjóðveldi.

Uppskotið var til aðru viðgerð í løgtinginum fríggjadagin í síðstu viku.

### Ber ikki til

Leisturin er einfaldur, sambært Bergtóru Høgnadóttir Joensen. Sólmiðstøðirnar skulu vera mannaðar, og ung fólk skulu vísa prógv fyri at taka sól. Tá er lætt og einfalt at syrgja fyri, at eingin brýtur lógina.

- Í kjakinum um solariumforboð hevur onkutíð verið sagt, at tað er so trupult at seta forboð um 18 ára aldursmark við tað, at tað er trupult at effuktuera, um sólmiðstøðirnar eru ómannaðar. Loysnin er, at frameftir verða bert sólmiðstøðir, sum eru mannaðar. Annars gevur forboðið onga meining. Tað kann sammetast við, at ung undir 18 ár ikki kunnu keypa sigarettir í handlum, men at tað ber til at keypa tær í automatum kortini. Meiningsleyst, skrivaði Bergtóra Høgnadóttir Joensen í viðmerkingunum.

Har kom ósemjan undir viðgerðini. Meirilutin í Trivnaðarnevndini, Jákup Mikkelsen, Fólkaflokkurin, Hans Pauli Strøm, Javnaðarflokkurin, Edva Jacobsen, Sambandsflokkurin, og Helgi Abrahamsen, Sambandsflokkurin, tóku undir við hugskotinum, at tiltøk skulu setast í verk fyri at minka um nýtsluna av solarium. Serliga fyri ung. Tey mæltu hinvegin samstundis frá at samtykkja hetta uppskotið. Grundgevingarnar vóru, at sólmiðstøðirnar hava ongan møguleika at bera seg fíggjarliga, um tær skulu vera mannaðar. Uppskotið vísti ikki á, hvussu sólmiðstøðirnar skulu hóra undan, hóast eitt fólk skal arbeiða á sólmiðstøðini, meðan tað er opið. Løgtingið skræðir grundarlagið undan sólmiðstøðunum, tí tær hava ongan møguleika umsitingarliga at vera mannaðar. Mest sum allar sólmiðstøðirnar noyðast at snara lyklinum, um uppskotið var samtykt, metti meirilutin í Trivnaðarnevndini.

Tað verður ov trupult at fáa endarnar at røkka saman, segði Jákup Mikkelsen, formaður í Trivnaðarnevndini, á.

- Hetta uppskotið skal hugsast betri ígjøgnum, so tað ber til at umsita. Vit skulu ikki stongja allar sólstøðir í landinum, segði Jákup Mikkelsen.

Bergtóra Høgnadóttir Joensen tekur als ikki undir við meirilutanum í Trivnaðarnevndini.

> *Ung fólk hava serliga viðkvæma húð. Tannáringar eru í størri vanda enn eldri at fáa krabbamein av solarium.*

- Tað er spell, um fólk missa eina inntøku. Kortini eigur heilsan hjá teimum ungu at verða raðfest hægri. Tað er neyvan nakar í tinginum, sum hevði tikið undir við, at sigarettir og alkohol kunnu keypast í sjálvtøkum fyri at geva teimum vinnurekandi størri inntøkur, segði Bergtóra Høgnadóttir Joensen.

Politiska skipanin í Fraklandi, Týsklandi, Skotlandi og Íslandi hevur sett forboð móti solarium fyri sínar borgarar, sum eru yngru enn 18 ár. Líknandi uppskot eru eisini til viðgerð í Noregi og Danmark.

Tað er einki eftirlit við sólstøðunum í Føroyum, og tað er sostatt heldur einki eftirlit við, um sólrørini eru ov sterk, ella um trygdin er nøktandi.

### Upplýsa heldur enn forboð

John Johannessen er landsstýrismaður í heilsumálum. Tað bar ikki til hjá honum at vera til viðgerðina fríggjakvøldið. Honum dámar best at upplýsa heldur enn at seta forboð. Fleiri troyttast av forboðum, og forboðini kunnu vera so møðandi, at fólk vísa teimum aftur. Borgarar skulu ikki altíð kenna hendan peikifingurin frá almennu skipanini.

Gallup upplýsti í kanning í september í fjør, at føroyingar brúktu nógv minni solarium í 2010 enn í 2007. Tá tók meiri enn fimti hvør føroyingur sól. Talið var minkað niður á áleið sjeynda hvønn føroying í fjør. Úr 18 prosentum niður í 13 prosent.

Tað er bara við upplýsing, vísir John Johannessen á.

- Vit skulu sjálvsagt seta tiltøk í verk fyri at minka um nýtsluna. Tað eru ov nógvir ósvaraðir spurningar í hesum ítøkiliga uppskotinum hjá Tjóðveldi. Eingin veit, hvør skal hava eftirlitið við sólmiðstøðunum, og hvussu vit handhevja reglurnar, sigur landsstýrismaðurin í heilsumálum.

WHO og granskingardepilin fyri krabbamein, IARC, hava bólka solarium í hægsta vandabólkin, saman við asbest, sigarettir og arsenik.

### Uppskotið fall

Uppskotið fall undir aðru viðgerð síðsta fríggjakvøld. Forboð verður ikki sett ungum føroyingum undir 18 ár at taka sól. Fyribils, í øllum førum. 18 atkvøður vóru ímóti, og 13 atkvøður vóru fyri. Eingin var blonk.